

Mynd: BP

# Iran vil hava OPEC til at minka um oljuframleiðsluna

**Jógvan Hugo Gardar**

24.10.2015 - 14:33

Oljan.fo

Oljuframleiðandi londini í OPEC-felagsskapinum eiga at stuðla arbeiðnum við at fáa oljuprísin at hækka aftur. Tað er iranski oljumálaráðharrin Bijan Namdar Zanganeh sum sigur hetta í samrøðu við Bloomberg News. Hann heldur at londini eiga at minka um oljuframleiðsluna so prísurin kemur at hækka til millum 70 og 80 dollarar fyri fatið av olju.

OPEC-londini hava farnu 16 mánaðirnar hildu fraleiðsluni nakað hægri enn tað sum hevur verið almenna málið hja teimum. Hetta hevur gjørt at prísurin á Brent-oljuni er lækkaður við 42 prosentum farnu 12 mánaðirnar. Prísurin á Brent-oljuni er í dag knappar 48 dollarar fyri fatið.

- Í løtuni er eingin nøgdur. OPEC burdi brúkt sínar møguleikar til at stýra prísinum við at minka um framleiðsluna, sigur oljumálaráðharrin í samrøðuni við Bloomberg News.

Iran, ið ikki hevur havt atgongd til altjóða oljumarknaðin í nógv ár hevur ætlanir um at gera íløgur í oljuídnaðin fyri 100 milliardir dollarar komandi fimm-seks árini.

OPEC-londni hittast til ársfund í Wien tann 4. desember, har oljuprísurin og framleiðslan er á dagsskránni.